# FÓLKIÐ FYRST



Góðu veljarar

Javnaðarflokkurin stendur sum verji av øllum teimum málum, sum hava týdning fyri einum góðum lívi her á landi fyri frí og fræls menniskju. Hesuferð hava vit lagt serligan dent á at fremja nøkur ítøkilig mál í komandi valskeiði. Einki uttanumtos - ongar tómar orðingar. Javnaðarflokkurin setur sær verulig og ítøkilig mál, so veljarin veit, hvat ein atkvøða fyri Javnaðarflokkinum merkir. Tú kanst taka okkum upp á orðið, og tú fært at síggja, at vit megnaðu at halda orð.

Góði veljari. Vit leggja kortini á borðið, men okkum tørvar tína atkvøðu. Eina atkvøðu, sum borgar fyri einari savnandi loysn í ríkisrættarliga málinum - eina atkvøðu, sum setur lívskorini hjá føroyinginum aftur á dagsskrá.

Vit taka títt álit í fullum álvara, og tú kanst taka okkara valskrá í fullum álvara.

Bæði tú sum veljari og vit sum ein ábyrgdarfullur flokkur skylda fólkinum og landinum, at vit taka løgvatak saman 30. apríl 2002. Lat fyrsta løgtingsvalið í hesari øldini gerast eitt javnaðarval. Tað er ein nýggj byrjan, royna hana.

Gott val

C

JAVNAÐARFLOKKURIN



Innbrot á Sosialinum:

# Máling um alt rúmið

HERVERK

*Ingrid Bjarnastein*

Langa vikuskiftið er farið framvið, og eisini onkur ókunnuggestur hevur leitað sær út á gula blaðhúsið á Argjum. Í kjallaranum, har oljufýringin stendur, er onkur farin inn, og funnið nøkur málingablikk. Viðkomandi hevur helst hildið, at oljufýrrúmið hevur trongt til eina hjálpandi hond, og hevur tí oyst máling um alt rúmið. Hetta kundi sjálvandi havt við sær, at eldur kom í málingina, men tíbetur er onki álvarsamt hent. Í fýrrúminum skyggir nú gult og blátt, men um onkur skuldi fingið hug at gjørt hetta aftur, verður viðkomandi biðin um at venda sær til blaðleiðsluna.



*Innbrot hevur verið í kjallaranum á Sosialinum um vikuskiftið. Onkur hevur oyst máling um alt rúmið har oljufýringin stendur, men tíbetur er onki álvarsamt hent*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




Vel vælferð og framburð
Vel Javnaðarflokkin
Kári Petersen
Valevni Javnaðarfloksins
í Suðurstreymi
www.karipetersen.com

X VELJIÐ
Johnstones
TRÆVERJU
HON VERJIR BORG
X
máling
& gólv
Við Landavegin
Tórshavn • Tel. 31 60 66

